Dimmalætting

– ÁLÍTANDI TÍÐINDI

Mikudagur
19. mai 1999
Nr. 91
122. árgangur

Kr. 8,00

Trivnaður og økt fólkatal

Hálvtannað ár er farið síðani Sumbiartunnilin lat upp. Hóast vinnumøguleikarnir ikki eru øktir enn, so er fólkatalið aftur farið at økjast, samstundis sum trivnaður er í bygdini.

Heimatíðindi 5



NSÍ basti HB í Gundadali

Runavíkingar lupu hvøkk á meistararnar frá í fjør, tá teir mánakvøldið vunnu 3-1 á HB. Við sigrinum er NSÍ nú at finna millum fremstu liðini í 1. deild

Ítróttur 6

El-service um allan heimin

Tosar ein um eltalvur, slepst ikki uttan um El-Service á Skála, sum seinastu 11 árini hevur spent seg rættiliga út heima og úti. Nú hava teir júst gjørt størstu eltalvuna í Føroyum.

Heimatíðindi 5

Sunnan, 5-10 m/s. Hálvskyggjað ella skyggjað og viðhvørt támi, men turt. Hitin 8 og 13 stig.

Bispur farin at sálda prestar frá

Tríggir teir seinast settu prestarnir í Føroyum hava allir fingið fimm spurningar, sum teir skulu svara upp á. Kunnu teir ikki góðtaka kvinnuligar prestar og uppafturgiftu, vil bispur ikki geva teimum bláa stemplið

GEORG L. PETERSEN

«Tað harmar meg ómetaliga nógv, at viðurskiftini í føroysku kirkjuni nú skulu vera so háttað, at eg sum biskupur kenni meg noyddan at seta nýggjum prestum niðanfyrinevndu spurningar og biðja teir svara teimum».

Soleiðis leggur Hans J. Joensen út í einum brævi, sum verður sent kirkjuráðum og umsøkjarum til prestastørv. Bispur vísir á eitt rák innan føroysku kirkjuna, sum kann hava óhepnar avleiðingar – og tí vil hava greiðu á nøkrum spurningum fyrst.

Teir sjey spurningarnir eru soljóðandi:

1) Viðurkennir tú kvinnur sum prestar, og at tær eftir galdandi lóg fyri kirkju okkara eiga somu rættindi sum einhvør annar (mannligur) prestur?

2) Kanst tú samstarva við kvinnuligan prest bæði uttan og innan kirkjugátt?

3) Kanst tú vígja eitt par, har annað ella bæði eru fráskyld?

4) Kanst tú samstarva við fráskyldan prest bæði uttan og innan kirkjugátt?

5) Kanst tú samstarva við fráskyldan prest, ið er giftur aftur, bæði uttan og innan kirkjugátt?

6) Vilt tú nokta at doypa børn hjá foreldrum, ið liva saman uttan at vera gift ella vígd?

7) Vilt tú nokta fólkum, ið liva saman uttan at vera gift ella vígd, at koma til altarborðið?

Um prestaumsøkjarin ikki vil ganga øllum hesum á møti, fær hann ikki nakran stuðul frá bispi, sum hevur nakað at skula hava sagt í sambandi við setanina. Setanin av einum presti er nakað torskild, men í fyrsta umfari fer umsóknin til danska kirkjumálaráðið, sum so umvegis bisp sendir tað til føroysku kirkjuráðini. Bispur er við í einum parti av hesi viðgerð í kirkjuráðunum, men tað er ráðið einsamalt, sum tekur endaliga avgerð um at seta ella ei, og sendir innstillingina til bisp, sum kann koma við átekningum – heldur hann umsøkjaran vera óegnaðan, verður eingin viðmerking gjørd, og kirkjumálaráðið leggur rættiliga stóran týdning á hesa átekning.

Og tað er her, at spurningarnir koma inn, eins og bispurin kunnar kirkjuráðini um, hvat umsøkjarin hevur svarað. Í Danmark er mannagongdin nakað tann sama, og har fær umsøkjarin spurning 1 og 3. Nógv hevur verið funnist at hesi skipan og spurningum, sum standa í eini vegleiðing til kirkjuráðslimir, tí spurningarnir taka hesi evni fram um onnur, ið eru av størri týdningi fyri arbeiðið sum prestur.

Í Føroyum hevur henda mannagongd ongantíð áður verið brúkt, og vanliga kallar kirkuráðið ikki umsøkjarar á fund, sum gjørt verður í Danmark, áðrenn setanina. Men stríðið millum Olofsson, ið fær stuðul frá fleiri ungum nýggjum prestum, og bisp, hevur elvt til hesa broyttu mannagongd í føroysku kirkjuni.

«Orsøkin er hetta nýggja lagið innan kirkju okkara, sum var púra ókent her, til ein avísur persónur kom higar sum prestur. Eg óttist fyri, hvat henda nýggja gongdin fer at hava við sær», skrivar Hans J. Joensen m.a. í brævinum til kirkjuráðini og umsøkjararnar, sum eina grundgeving fyri spurningunum.

Kappingin um oyruni

EFTIR 42 ÁRA langt útvarpsmonopol eru nú tvær føroyskar útvarpsrásir, sum kappast um oyru okkara. Atlantic Radio legði frá landi fyri hálvari aðrari viku síðan, og mánadagin svaraði Útvarp Føroya aftur við einari nógv vaksnari summarskrá. Summarið 1999 verður soleiðis fyrsta summarið, har vit fara at zappa millum tvær útvarpsstøðir, tí hóast oyruni eru tvey, so mugu vit velja eina rás at lurta eftir.

Krydd hevur vent móttøkutólið ímóti teimum báðum føroysku sendistøðunum og í einum slagi av temablaðið í dag kanst tú hyggja afturum loftbylgjurnar.

LESIÐ EISINI um søguna innan telduspøl, sum byrjar longu í 18. øld og um amerikanska filmin American History X.

KRYDD

Marknasáttmálin undirskrivaður

Fremsta flaggið á myndini, Union Jack, var fyri góðum 50 árum síðani orsøkin til at Merkið í miðjuni fekk loyvið at veitra og varð málað á síðuna á føroyskum skipum. Dannebrog bleiv sett afturum og við samtyktini av marknasáttmálanum, er líkt til, at danska flaggið í framtíðini vil veittra enn longur afturi

LEIF LAADAL

Um alt gekk, sum tað skuldi í Vágum, so lendi bretski varauttanríkisráðharrin, Anthony Lloyd, við enskum Gulf Stream-flogfari seinnapartin í gjár. Síðani flutti tyrlan hann til Havnar, har hann saman við danska uttanríkisráðharranum, Niels Helveg Petersen og løgmanni Anfinni Kallsberg, skrivaði undir marknasáttmála millum føroyingar og bretar.

Miðlinjan, hetta óskylduga orð, er upprunaliga orsøkin til, at føroyingar og bretar tey seinastu 22 árini hava klandrast um markið millum londini. Áðrenn 1977 var einki at klandrast um, tí fiskimørkini hjá londunum báðum rukku ikki út á 200 fjórðingar.

Fyrsta januar í 1977 fingu Føroyar 200 fjórðinga fiskimark, men samstundis byrjaði stríðið, tí altjóða havrætturin segði, at miðlinjan skuldi brúkast, um minni enn 400 fjóðingar vóru millum lond. Hetta góðtóku bæði Bretland og Føroyar. Munurin var tó, at bretar roknaðu miðlinjuna úr nøkrum holmum í ein útnorður úr Skotland. Hetta góðtóku føroyingar ikki og svaraðu aftur við at rokna sínar fjórðingar úr Sumbiarhólmi. So var «kriggj».

Tað bleiv Anfinn Kallsberg, ið sat sum løgmaður tann dagin partarnir avgjørdu at grava stríðsøksina. Ein samráðingarfinta, har bólturin bleiv spældur uttanum teir tungu topppolitikararnar og yvir á høgra vong til teir meiri óformellu dreingirnar, hevði sambært løgmanni við sær, at endaliga avtalan kom undir land.

Tann 18. mai bleiv sostatt dagurin, tá ið viðurskiftini millum Union Jack og Merkið aftur blivu sum fyrsta dagin.



Mynd: Kalmar